

# Norska frálandavinnan er trygg

Deil:

**Jan Müller**

25.07.2014 - 06:35

Oljan.fo

Nú norsku myndugleikarnir ávara um yvirgang, eru tað fleiri, sum siga, at norski oljuídnaðurin má metast sum eitt av teimum fremstu álopsmálunum. Eitt nú hava fregnartænastan hjá løgregluni og tann tjóðskaparliga trygdartænastan sagt, at frálandavinnan stendur ovarlaga á listanum hjá teimum, sum fáast við njósning og yvirgang.

Men Bernand Duncan Lyng, sum er fyrrverandi trygdarstjóri hjá Statoil, heldur, at trygdin í norsku frálandavinnuni er góð, og at hon er nógv betri enn trygdin uppi á landi í Noregi.

-Tað er kortini ikki norðmonnum fyri at takka, at trygdin er góð, men heldur amerikanarum og fransmonum, sum stóðu fyri trygdarskipanunum í Norðsjónum í 1970-árunum. Tað hevur gjørt, at Noreg hevur hildið seg til altjóða trygdarreglur, sigur Bernard Duncan Lyng við Dagens Næringsliv.

Spurdur, um teir norsku oljupallarnir eru tryggir, svarar hann avgjørdur:

-Svarið er eitt treytaleyst ja. Oljuídnaðurin hevur gingið undan, tá tað hevur snúð seg um trygd, sigur hann.

-Tað er sera lítið hent síðani 22.juli í 2011. Vit hava framvegis ikki eina landsumfatandi antiyvirgangsleiðslu, og tey 27 løgregluøkini kunnu hvør sær meta um ein møguligan yvirgangsvanda og seta trygdina hareftir.

Í fjør ávaraðu fleiri yvirgangsgranskarar og álitisfólk um, at tilbúgvingin er ikki nóg góð í olju- og gassídnaðinum. Men olju- og orkumálaráðið svaraði, at tað er ikki neyðugt við eyka verjutiltøkum fyri olju- og gassídnaðin.